# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Pætur Joensen, Fuglafjørður:

## Býarverkfrøðingur í 25 ár

**Mánadagin 1. desember var móttøka í býráðshúsinum í Fuglafirði í sambandi við at Pætur Joensen, býarverkfrøðingur, hevði 25 ára starvsdag hjá Fuglafjarðar kommunu**



*Sigurð Simonsen, borgarstjóri, og Pætur Joensen, býarverkfrøðingur*
*Mynd : Maria Olsen*

Nógv fólk stukku inn á gólvið hendan dagin, fleiri talur vóru hildnar á samkomuni. Tey sum hildu røðu vóru: Sigurð Simonsen, borgarstjóri, Dánjal Vang, formaður í teknisku nevnd, og Sæunn Ólavsdóttir, formaður í stýrinum fyri Eysturoyar Røktar & Ellisheim.

Eisini hevði Petur Martin Petersen í Fuglafirði yrkt ein sang til høvið.

Pætur er 54 ára gamal og fuglfirðingur, sonur Mathildu, f. Petersen, og Albert Joensen, bæði úr Fuglafirði.

Hann lærdi til snikkara í Fuglafirði frá 1967-71. Síðan fór hann til Danmarkar at lesa til verk-frøðing og kom heim aftur í 1976. Hann arbeiddi hjá Landsbyggifelagnum í Havn í tvey ár, til hann bleiv settur sum kommunuverkfrøðingur 1. desember 1978. Tá Fuglafjørður fekk býarheiti í 1993 bleiv hann býarverkfrøðingur.

Pætur var fyrsti verkfrøðingur hjá Fuglafjarðar kommunu, og hevur hann verið við til at uppbyggja teknisku deild hjá býráðnum í Fuglafirði. Sum leiðari av teknisku deild hevur hann staðið fyri projektering av havnum, vegum, kloakkum, tunnlum, útstykkingum, skúlum og eldrasambýlinum í bygdini.

Hann er formaður í bygginevndini fyri Eysturoyar Røktar & Ellisheim og nevndarlimur Sjúkrakassa Fuglafjarðar Læknadømis.

Pætur er giftur við Aspu, f. Hansen, úr Fuglafirði og tey eiga tvey børn, Albert, sum lesur til verkfrøðing í Aalborg og Mathildu, sum gongur á studentaskúlanum á Kambsdali.



*Jógvan S. Simonsen og Jólsvein Joensen heilsa upp á Pætur Joensen*
*Mynd. Maria Olsen*



*Her verður sangurin, sum Petur Martin Petersen hevði gjørt til dagin, sungin*
*Mynd: Maria Olsen*





*Sæunn Ólavsóttir og Dánjal Vang hildu røður*
*Mynd: Maria Olsen*



*Fremst á myndini eru Sofus M. Jakobsen úr Havn, og Árni Joensen, bygdaráðsformaður í Oyndarfirði*
*Mynd: Maria Olsen*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 30 ára starvsdagur

Í ár eru 30 ár síðani Frank Antoniussen kom í starv sum verkfrøðingur hjá Vágs Kommunu.

Frank er ættaður úr Oyndafirði, foreldrini vóru Esbern og Ragnhild Antoniussen.

Pápin var ættaður úr Oyndafirði og Mamman úr Húsavík.

Systkini eru 6 í tali.

Antinis býr í Kollafirði. Klæmint býr í Íslandi, Hildibjartur býr í Havn, Kai býr í Havn, Sunniva býr í Danmark og Frank býr í Vági.

Frank er giftur við Karini (fødd Hove). Tey eiga tvey børn. Katrin býr í Danmark og Tommy býr í Vági.



Aftan á fólkaskúlan fór Frank til skips við Juni á saltfiskaveiðu undir Íslandi. Eisini var hann við Poppy á sildaveiðu og við Esther á ísfiskaveiðu undir Føroyum.

Í 1964 fór hann at læra til bygningssnikkara hjá Jensen & Bungaard í Keypmannahavn, og síðani tók hann prógv sum bygningsverkfrøðingur frá Københavns Teknikum.

Í Keypmannahavn kom Frank at kenna Karina frá Brønshøj, og giftust tey á Ráðhúsinum í Keypmannahavn í 1977.



*Øllum tykkum, sum gleddu meg við at støkka inn á gólvið, við telefonheilsanum, blómum og gávum í sambandi við 80 ára føðingardagshaldið 25. oktober 2003, takki eg hjartaliga.*

**Magnus Pauli Johannesen**
**Vestmanna**

## Spæl V4 ókeypis við talutíðarkorti

*Øssur Winthereig*

Føroya Tele hevur tilboð upp á talutíðarkort, har tú fært 150 krónur í talutíð, men skal bert gjalda 100 krónur.

Fyri tey, sum vilja spæla V4 um fartelefonina, so er ikki av leið at gera tað frá einum av hesum talutíðarkortunum. Tá tú keypir eitt kort fyri 100 krónur, sum er vert 150 krónur, so merkir tað at tú kanst senda tveir V4 seðlar, sum Føroya Tele í roynd og veru rindar fyri.Útvarpið fær sín pening, men tað er Føroya Tele sum rindar.

- Tað er rætt at hatta ber til, men vit fata tilboðið upp á talutíðarkort, sum ein vanliga príslækking, sigur Heini Joensen, fíggjarstjóri í Føroya Tele.

*- Men um V4 verður goldið av einum talutíðarkortið keypt upp á tilboð, so merkir tað, at ein partur av yvirskotinum hjá Føroya Tele fer til Útvarp Føroya?*




- Ja, kanska, men ein príslækking av hesum slag merkir eisini, at tú kanska kann keypa størri jólagávur.

*- Men Føroya Tele hevur ikki avtalur við tey sum selja jólagávur?*

- Nei, men vit síggja hetta sum eina príslækking, sum kan brúkast til alt. Og harafturat er hetta eitt tíðaravmarkað tilboð, sigur Heini Joensen í telefonini frá Føroya Tele.

### Dagurin

**4. desember. Barbara,** deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at tann vakra gentan varð vorðin kristin, og heidni faðir hennara stongdi hana inni í einum torni. Hon vildi ikki ganga frá trúnni, og at enda læt faðirin sjálvur hana hálshøgga.

Navnið er grikst og merkir *fremmand*.

## Jóannes Nielsen innstillaður til virðisløn

Dómsnevndin fyri bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins hevur í dag gjørt innstillingar til virðislønina fyri 2004. Jóannes Nielsen úr Havn er føroyska umboðið við yrkingasavninum Brúgvar av svongum orðum.

Endaligi virðislønarvinnarin verður kunngjørdur á fundi í dómsnevndini í Danmark síðst í februar í 2004. Virðirsløønin er 350.000 danskar krónur. Virðislønin verður latin í november í 2004 í Svøríki.

Tey innstillaðu eru annars:

DANMARK
Vibeke Grønfeldt
Det nye
Roman, Samleren 2003

Peter Nielsen
Livet foreslår
Dikter, Lindhardt og Ringhof 2003

FINLAND
Kari Hotakainen
Juoksuhaudantie (Löpgravsvägen)
Roman, WSOY 2002 (övers: Camilla Frostell)

Lars Sund
Eriks bok
Roman, Söderströms 2003

ISLAND
Ingibjörg Haraldsdóttir
Hvar sem ég verð (Vart det än bär)
Dikter, Mál og menning 2002
(övers. John Swedenmark)

Jón Kalman Stefánsson
Ýmislegt um risafurur og tímann
(Lite av varje om jättetallar och tid)
Roman, Bjartur 2002 (övers. John Swedenmark)

NORGE
Roy Jacobsen
Frost
Roman, Cappelens Forlag 2003

Inger Elisabeth Hansen
Trask. Forflytninger i tidas skitne fylde
Diktsamling, Aschehoug Forlag 2003

SVERIGE
Kristina Lugn
Hej då, ha det så bra!
Dikter, Albert Bonniers Förlag 2003

Steve Sem-Sandberg
Ravensbrück
Roman, Albert Bonniers Förlag 2003

FÄRÖARNA



Jóanes Nielsen
Brúgvar av svongum orðum
(Broer af sultne ord)
Diktsamling, Mentunargrunnur Studentafelagsins 2002
(övers. Ebba Hentze)

GRÖNLAND
Kristian Olsen aaju
Oqaatsit Nunaat - Ordenes Land
Diktsamling, Atuagkat 2003

DET SAMISKA
SPRÅKOMRÅDET
Inger Mari Aikio-Arianaick
Máilmmis dása (Fra verden og hit)
Diktsamling, DAT 2001